Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Kostnaður av grønum stuðulsskipanum

Spurningar:

1. Hvat hevur tað kostað landskassanum at stuðla el-, vetnis- og hybridbilum við mvg afturbering, síðani hendan stuðulsskipan bleiv sett í verk, býtt á ár?

2. Hvat hevur tað kostað landskassanum at stuðla el-, vetnis- og hybridbilum við lægri skrásetingargjaldi, síðani hendan stuðulsskipan bleiv sett í verk, býtt á ár?

3. Hvussu nógvir el-, vetnis- og hybridbilar eru seldir, síðani stuðul er latin til hesar og tey 5 árini undan, býtt á ár?

4. Hvussu nógv hevur tað kostað landskassanum at lata el- og vetnis bilum lægri vektgjøld, síðani hendan stuðulsskipan bleiv sett í verk?

5. Hvat hevur tað kostað landskassanum at stuðla hitapumpuskipanum og jarðhitaboringum við mvg afturbering, síðani hendan stuðulsskipan bleiv sett í verk, býtt á ár?

6. Hvussu nógvar hitapumpur eru seldar, og hvussu nógv jarðhitahol eru boraði, síðani stuðul er latin til hetta og tey 5 árini undan, býtt á ár?

7. Hvussu nógv metir Fíggjarmálaráðið, at allar tær grønu stuðulsskipanirnar hava kostað landskassanum, frá tí at tær blivu settar í verk til dagin í dag?

8. Allar grønar stuðulsskipanir vera fasaðar út, undantikið stuðulin sum el- og vetnisbilar fáa í vegskattinum. Ætlar landsstýriskvinnan at gera nakað við hetta?

Viðmerkingar:
Tað eru nógvar grønar stuðulsskipanir settar í verk fyri at fremja grøna orkuskiftið. Hesar skipanir vísa seg tó at verða rættiliga dýrar fyri landskassan. Flestu av teimum vera fasaðar út nú, men spurningurin verður settur fyri at fáa dagførd tøl uppá, hvat hesar stuðulsskipanir hava kostað landskassanum higartil.

Á Løgtingi, 17. februar 2026

Steffan Klein Poulsen